# Vakmyndatól

*Temasíðurnar í Vikuskiftis Sosialinum hesaferð fara aftur um vakmyndatól í almenna rúminum. Les um tey, sum halda vakmyndatól vera av tí góða og tey, sum halda vakmyndatól eru sjúkueyðkenni. Les royndirnar aðrastaðni og siggj hvar vakmyndatól eru í Føroyum*

Barbara Holm
*Redaktørur á Vikuskiftis Sosialinum*

## Frælsi ella tryggleiki?

***Hvussu nógv frælsi vilt tú geva frá tær og hví? Ein spurning óendaliga stórur og torførur at svara***



Meðan summi bert ynskja frælsi at ganga saman í hjúnarlag við sínum maka, eru tey onnur, sum berjast fyri frælsinum at liva og virka í modernaða samfelagnum uttan neyðturviliga at virka á internetinum. Hugtakið frælsi er vítt og ódefinerbart og kortini av alstórum týdningi fyri hvønn einstakan og fyri hvørt samfelag.

Tí er spurningurin um vakmyndatól ein praktiskur, juridiskur, rættarligur og frælsisviðkomandi spurningur. Seinastu mongu árini hevur alsamt størri fokus verið á tí persónliga frælsinum kontra tann tryggleikan, sum vakmyndaeftirlit gevur. Nei, myndugleikarnir í USA kunnu ikki sleppa at halda loyniligt eftirlit við borgarunum, eru vit helst øll samd um. Hinvegin hava vit einki ímóti, at videoupptøkur verða nýttar, tá ið lógarbrot skulu avdúkast.

Men hvussu hevði tú havt tað, um tínar relativt privatu løtur í almennum rúmi vórðu avmyndaðar? Hevði tað gjørt mun, um tað var ein tannáringur við einari snildfon ella løgreglan, sum gjørdi tað? Um tú vart álopin í býnum og videoupptøkurnar loystu gátuna, hevði tú helst verið fegin. Um tú hinvegin varð avmyndaður í einari ósekari men privatari løtu, hevði tú kanska havt tað øðrvísi.

Tí er prinsipielli spurningurin áhugaverdur. Hvat hevur størri týdning – tryggleikin ella persónliga frælsið?

Og víðari – hvussu nógv av okkara frælsi vilja vit uppgeva í navni tryggleikans?

Í londum kring okkum hava vit til dømis sæð hvassar pennar halda fram við at skriva, hóast yvirgangshóttanir móti skrivifrælsinum. Vit hava eisini sæð tey, sum eru brotnað undir trýstinum og hava latið seg kúgað fyri tryggleikans skyld.

Báðar støður eins skiljandi.

Tað eru fleiri vakmyndatól í Føroyum. Men framvegis er ikki loyvt at nýta tey óavmarkað í okkara samfelag, hóast summi eru forsprákarar fyri tí. Í londunum kring okkum vísa kanningar, at vakmyndaeftirlitl í almenna rúminum ikki hevur minkað um kriminalitet, hóast tað hevur givið betri møguleika fyri at uppklára fleiri lógarbrot.

Prísurin vit rinda fyri hendan tryggleikan er okkara frælsi at ferðast í almenna rúminum uttan at verða avmyndað. Hvat hevði tú valt?

Les meira um vakmyndatól í Føroyum, hvat ymiskir føroyingar halda og hvussu royndirnar eru aðrastaðni, í temasíðunum í dag.



# VAKMYNDATÓL SKAPA EIN FALSKAN TRYGGLEIKA

*Talið av vakmyndatólum í Føroyum tykist at økjast, men enn mangla vit hagtøl fyri, um tey veruliga økja um trygdina*

SIGURJÓN EINARSON

Í september mánaði í fjør var ein ung kvinna síðst í 20-unum út fyri eini neyðtøkuroynd aftanfyri Sjónleikarahúsið í Havn. Unga kvinnan megnaði tó at berja mannin av sær, ið slapp sær til rýmingar. Vakmyndatól í býnum hjálptu tó løgregluni við at eyðmerkja mannin, sum bleiv handtikin og varðhaldsfongslaður. Maðurin skal fyri rættin 18. mei, eftir at hava sitið varðhaldsfongslaður í yvir sjey mánaðir.

Í Føroyum verður ikki kjakast nógv um vakmyndatól, men sambært Dátueftirlitinum, veksur talið av vakmyndatólum støðugt. Í 2007

> **»Hendir nakað revsivert, hevur løgreglan heimild at síggja upptøkurnar á staðnum og harvið uppklára møgulig lógarbrot«**

skyldu um vakmyndatól sett í gildi. Sambært nýggju reglunum í kunngerðini, skulu øll vakmyndatól fráboðast Dátueftirlitinum. Seinastu tølini eru frá 2012, og tá vóru tilsamans 943 vakmyndatól fráboðað.

Dátueftirlitið veit eisini at siga, at tey fáa alt fleiri fyrispurningar um, at meira vakmyndatól verða sett upp á ymiskum almennum støðum.

Javnan hevur verið frammi, at Tórshavnar Kommuna og løgreglan í Havn hava havt ynski um at fáa møguleikan at seta vakmyndatól upp í útsettum støðum í Havn, sum eitt nú í klubbagarðinum, í Steinatúni o.l. støðum.

Í desember mánaði í fjør fekk

fýra vakmyndatól í miðbýnum, eftir at fleiri herverk vórðu framd móti jólatrøum. Vakmyndatólini skuldu, í hesum førum, virka fyribyrgjandi, sambært Heðin Mortensen, borgarstjóra.

»Hendir nakað revsivert, hevur løgreglan heimild at síggja upptøkurnar á staðnum og harvið uppklára møgulig lógarbrot«, segði borgarstjórin í desember í fjør.

## Ein falskur tryggleiki?

Vakmyndatól kunnu hjálpa til at fyribyrgja og avdúka brotsverk, men hóast hetta, er tað eisini sera umráðandi at hugsa um avleiðingarnar, áðrenn avgjørt verður at seta vakmyndatól upp á almennum økjum ella heima við hús. Vit mugu spyrja okkum sjálvi, hvat endamálið er við eftirlitinum. Fer tað at økja um tryggleikan? Og hvørjar eru fylgjurnar?

Í Føroyum hava vit eingi hagtøl, sum prógva, at alsamt fleiri vakmyndatól hava færri brotsgerðir við sær. Men hyggja vit eftir Stórabretlandi, ið hevur flest vakmyndatól pr. íbúgva, so siga hagtølini har, at fólk halda seg ikki aftur at fremja brotsverk.

Í 2008 varð mett, at tað vóru tilsamans 4,2 mió. vakmyndatól í Stórabretlandi – harav áleið 500.000 í London. Har hevur tað víst seg, at løgreglan ikki fangar fleiri brotsmenn í umráðum í London, har vakmyndatól næstan er á hvørjum húsahorni, sammett við býarpartar, har næstan eingin vakmyndatól vóru.

Ein frágreiðing frá 2008 frá løgregluovastunum í Stórabretlandi kom fram til, at bert 3 % av øllum brotsgerðum vóru uppkláraðar takkað verið vakmyndatólum. Í London stóð verri til. Har vísti tað seg, at bert ein brotsgerð varð uppklárað pr. 1.000 vakmyndatól. Harafturímóti er tað heldur ikki heilt bíligt at hava vakmyndatól. Frá ár 2000 og fram til 2008 kostaði tað 1,8 milliardir krónur at hava vakmyndatól í London.

Í Danmark hava tey slept ætlanum, at hava meira vakmyndatól í almenna rúminum. Har vísir gransking, at vakmyndatól hevur lítla ávirkan, tá tað kemur til álvarsom brotsverk. Drukkin fólk ella gerðir, framdar í einari sinnisrørlsu, eru ikki tengdar at, at tað verður tikið atlit til vakmyndatól. Danska kriminalforsorgin hevur eisini talað at. Hon metir, at vakmyndatól er ein følsk trygd – at tey hvørki verja borgaran ella fyribyrgja harðskap. Kriminalforsorgin mælir heldur til at fara tann menniskjaliga vegin, har skúli, sosialir myndugleikar og løgreglan arbeiða tætt saman.

## Skal, skal ikki?

Semja tykist ikki vera á økinum um, hvørt vakmyndatól gera eitt samfelag tryggari ella ikki. Eisini er torført at siga, hvussu støðugt eftirlit ávirkar tann einstaka borgaran ella okkum menniskju sum heild.

Ein annar trupulleiki er, tá ein ikki veit, hvat ein skal halda eyga við. Ein brotsmaður sær ikki út uppá ein ávísan máta, og hann uppførir seg heldur ikki illgrunavert.

Vakmyndatól steðgaðu ikki yvirganginum í London í 2005, men vakmyndatólini vóru við til at uppklárað sakina. Á myndunum síggjast nakrir heilt vanligir menn við ryggsekki fara spákandi inn í eina farstøð. Sjálvt ikki tann royndasti vakmyndaansari kundi gitt, at tað júst vóru hesir mans – millum fleiri túsund onnur, ið vóru yvirgangsmenn.

Hóast eitt vakmyndatól skrásetur alt og øll, kann tað, í sjálvum sær, ikki forða fyri einari brotsgerð – heldur ikki henni aftanfyri Sjónleikarahúsið í september í fjør.

SOSIALURIN 52 FRÍGGJADAGUR 6. MAI 2016 VIKUSKIFTI 15

# VAKMYNDATÓL UM ALLAN BÝIN

– Hetta við, at man skal verja almenningin, tað er nakað øgiligt tvætl, tí øll ganga runt við eini smartfon í dag. Um tú gongur fullur runt í býnum eitt kvøld, so kanst tú vænta at síggja tað á Facebook eina løtu aftaná. Tað sigur Jógvan Páll Lassen, advokatur, ið metir at vakmyndatól í býarlívinum ikki gera seg inn á privatlívið hjá borgarum

## Advokatur

HALLUR AV RANA

Síðani yvirgangsálopini í New York 11. september 2001 er vakmyndatól og hert eftirlit vorðin ein alsamt størri partur av lívinum hjá flestu evropearum. Serliga Bretland verður mangan brúkt sum ein ræðumynd, har mett verður at eitt vakmyndatól er fyri hvørji ellivu persónar í landinum.

Fyri flestu fólk er talan um eina tvístøðu, ið George Orwell lýsti væl í skaldsøguni 1984, ið var um eitt samfelag har borgarar vóru undir áhaldandi eftirliti.

– Valið hjá mannaættini er millum at velja millum frælsi ella lukku, og fyri meginpartin er lukkan betri, skrivar George Orwell í klassisku skaldsøguni.

Mótstøðufólk til vakmyndatól vísa vanliga til, at tað almenna fær ov lætta atgongd til ov nógvar privatar upplýsingar hjá einum borgarum, ið ikki longu kunnu ferðast frítt runt í egnum landi, meðan hin síðan vísir á, at tað er neyðugt at uppgeva nakað av frælsinum, um tað merkir at samfelagið sum heild verður tryggari.

Eisini í Føroyum hevur verið kjakast um evnið, har tað serliga hevur verið ført fram, at tað er neyðugt við kykmyndatólum í miðbýnum, so løgreglan hevur betri tól at arbeiða við í harðskapsmálum.



– Fólk eru ávirkaði, og onkur kanska øgiliga fullur, og tá gleppur í minninum. Oftani sært tú heldur ikki nakað fyrr enn ein maður liggur á vegnum, sigur Jógvan Páll Lassen

SAVNSMYNDIR: ÁLVUR HARALDSEN

**Tað átti at verði sett vakmyndatól upp allastaðni í miðbýnum. Tað hevði hjálpt munandi, tí tað hevði virka avkriminaliserandi og vit høvdu fingið prógvini lýst munandi betri í rættinum«**

### Vakmyndatól allastaðni

Ein teirra, ið eftirlýsir fleiri vakmyndatól, er Jógvan Páll Lassen, advokatur, ið hevur drúgvar royndir frá rættarskipanini, har hann hevur umboðað báðar síðir í harðskapsmálum. Í hansara hugaheimi er eingin ivi um, at vakmyndatól eru við til at gera føroyska samfelagið tryggari.

– Tað átti at verði sett vakmyndatól upp allastaðni í miðbýnum. Tað hevði hjálpt munandi, tí tað hevði virka avkriminaliserandi og vit høvdu fingið prógvini lýst munandi betri í rættinum.

Royndi advokaturin vísir á, at

eina greiða mynd um hvat er hent, tá fólk eru farin til hendurs í náttarlívinum.

– Trupulleikin er, at um onkur fer til hendurs í býnum, so kann tað vera tí onkur fullur persónur dettur á onkran annan, og hin tekur og knallar hann niður. Tá veit eingin, hví tað er hent, og eingin sá, hvat hendi fyrst, og hvat hendi aftaná. Vitnini síggja tað mítt í einum samanhangi, og sóu ikki hvussu tað byrjaði, sigur Jógvan Páll Lassen.

Tað hjálpir heldur ikki, at eitt av eyðkennunum við nógvum harðskapsmálum er, at partarnir í málinum eru ávirkaði av rúsdrekka.

– Fólk eru ávirkaði, og onkur kanska øgiliga fullur, og tá gleppur í minninum. Oftani sært tú heldur ikki nakað fyrr enn ein maður liggur á vegnum. Tað kann gott vera, at hann hevur sparkað hin við fullari kraft í nossini fyrst. Tað eru slík ting, ið vakmyndatól kunnu vísa okkum, sigur Jógvan Páll Lassen og leggur aftrat.

– Tað er oftani øgiliga lítið skil á teimum frágreiðingum, ið vit hoyra í einum rættarmáli viðvíkjandi harðskapi í býnum. So tá man stendur í rættinum, undrast man



### Rætturin til privatlív er avmarkað

Mótstøðufólk av at seta vakmyndatól upp vísa mangan á, at slík tól ganga privatlívinum ov nær. Ført verður fram, at fólk mugu hava lov til at flyta seg í almenna rúminum, uttan at myndugleikar kunnu fylgja teimum hvørt fet á leiðini.

Slík sjónarmið rína tó ikki við hjá Jógvani Páll Lassen, ið metir at eingin kann fara í býin í dag og vænta, at tað ikki verður skjalfest av øðrum.

– Hvat hevur tú av privatlívi

kanst tú vænta, at onkur stendur og filmar teg. Hetta við, at man skal verja almenningin, tað er nakað øgiligt tvætl, tí øll ganga runt við eini smartfon í dag. Um tú gongur fullur runt í býnum eitt kvøld, so kanst tú vænta at síggja tað á Facebook eina løtu aftaná.

Jógvan Páll Lassen metir, at rætturin til privatlív einans fevnir um tað, ið tú gert í egna heimi, og ikki tað tú gert á almennum støðum.

– Tú ert vardur privat inni hjá tær sjálvum. Tað vil siga, at eingin kann koma inn í túnið hjá tær og

uttanfyri, men tá tú gongur í almennum støðum, so sum í Steinatúni og í miðbýnum, har alt náttarlívið fyrigongur, so eru tað almenn støð og har kanst tú vænta at verða filmaður.

### Víðar heimildir

Advokaturin hevur eisini fult álit á, at myndugleikarnir megna at handfara slíkt tilfar rætt.

– Eg gangi út frá, at løgreglan ikki fer at hyggja eftir tær, tá tú ert í býnum, fyri stuttleikar, men at slíkt tilfar verður brúkt í samband við at okkurt mál skal loysast, sigur

Spurdur um tað als ikki skulu vera nakrar forðingar fyri hvat ella hvar eitt slíkt vakmyndatól kann filma í miðbýnum, svarar advokaturin, at hann ikki metir, at tað er neyðugt við nøkrum forðingum.

– Eg haldi ikki, at tað skulu vera nakrar forðingar. Setið vakmyndatól upp ymsastaðni, ið kunnu skjalfesta hvat hendir. Um so okkurt er áfatt, so kann løgreglan fara eftir tilfarinum. Síðani kunnu tey biðja um loyvi frá rættinum, um tey ynskja at brúka tað í einum ávísum

## Løgtingsformaður



# Vakmyndatól er eitt sjúkraeyðkenni

***Tað er onkursvegna eitt afturstig fyri mannaættina. Vit hava roynt at ment okkum sum samfelag í túsundtals av árum, og skal man koma hartil, at vit í 2020 mugu hvør í sínum lagi seta myndatól upp, ið filmar hvønn annan 24 tímar um døgnið, er talan um eitt stórt afturstig fyri okkum sum samfelag. Tað sigur Páll á Reynatúgvu, løgtingsformaður, ið heldur at eftirlitssamfelagið er vorði ov sterkt***

HALLUR AV RANA

Seinastu hálva árið hava hvørt fall tveir tilburðir av harðskapi verið á Tinghúsvegnum og økinum kring Klubbagarðin, har løgreglan og ákæruvaldið hava sóknast eftir vitnum, ið kundu greiða frá tilburðunum.

Í báðum førum eydnaðist tað løgregluni at finna vitnir, og tað eina málið er longu avgreitt í rættarskipanini. Felags fyri bæði málini er tó, at óvissa hevur verið um júst hvat er hent, tá fólk vórðu rakt av meiningsleysum harðskapi. Aðrastaðni í blaðnum ber til at lesa samrøðu við Jógvan Páll Lassen, advokat, har hann førir fram, at vakmyndatól kunnu geva myndugleikunum betri fatan av hvat hendir í slíkum málum.

Yvirav Klubbagarðinum liggur Løgtingið, har løgtingsformaðurin Páll á Reynatúgvu hevur sína dagliga gongd. Hann øtast gongdina, har neyðugt er við fleiri vakmyndatólum.

– Styrkin í føroyska samfelagnum hevur verið, at vit eru eitt samfelag, har vit í høvuðsheitum byggja okkara sameksistens á álit á hvønn annan. Persónliga dámar mær ikki eitt samfelag, har vit skulu hava eftirlit við hvørjum øðrum, og uppaftur minni, um vit skulu hava vakmyndatól allastaðni har vit eru. Tað er bæði galdandi á alnetinum og í býarlívinum.

### Eitt sjúkraeyðkenni

Um tað er so, at kriminaliteturin er so stórur í føroyska samfelagnum, so heldur løgtingsformaðurin, at tað er betur at loysa rótina til trupulleikan, enn at økja um eftirlitið.



– Tvørturímóti haldi eg, at vit mugu fara hinvegin aftur, at fólk kunnu hava tað frælsi at vera tey, ið tey eru, sigur Páll á Reynatúgvu

– Eg loyvi mær at ivast í, um rákið við meira eftirliti ikki er eitt sjúkraeyðkenni í einum samfelag, ið ikki virkar nóg væl, og sum grundleggjandi ikki tekur sína sosialu uppalingarábyrgd í nóg stórum álvara. Tað er ein trupulleiki í einum modernaðum samfelag, um vit eru komin har til, at vit mugu hava vakmyndatól vend móti gudi og hvørjum manni á hvørjum staði í landinum, sigur Páll á Reynatúgvu og leggur afturat.

Um tað er so, at kriminaliteturin er vaksandi, so mugu myndugleikarnar hyggja eftir rótini til tann trupulleikan, og finna eina loysn har, heldur enn at gera seg inn á frælsi hjá borgaranum til sítt privatlív.

– Eg haldi ikki, at svarið upp á brotsverk í samfelagnum er, at vit skulu hava eitt samfelag har vakmyndatól halda eyga við gudi og hvørjum manni, ið livur í hesum landi. So er betri at styrkja tær sosialu skipanirnar í samfelagnum, so vit fáa góðar og vælvirkandi borgarar, og síðani revsa tey, ið skulu revsast, og stuðla teimum, ið hava brúk fyri stuðli.

Loysnin til trupulleikan heldur løgtingsformaðurin heldur vera í sjálvi uppalingini.

– Um eitt samfelag ikki megnar at føra víðari tey góðu menniskjaligi virðini til næsta ættarlið, so er okkurt galið. Tí tað gevur ikki meining, at eitt samfelag við 49.000 fólkum skal hava vakmyndatól av hvørjum einasta føroyingi. So mugu vit spyrja hvønn annan, hvussu vit skipa uppalingina av komandi ættarliði.

### Óttast gongdina

Sum heild, so stúrir Páll á Reynatúgvu yvir eina gongd, har eftirlit verður ein alsamt størri partur av samfelagnum, og privatlívið ikki verður virt longur.

– Eygleiðingin av okkara lívi er vorðin ov stór. Serliga á netinum, men eisini tað, at um eg sum privatpersónar fari í býin eina ferð um árið, so havi eg ongan áhuga í, at enda á Facebook-síðum hjá dansistøðum ella aðrastaðni. Tvørturímóti haldi eg, at vit mugu fara hinvegin aftur, at fólk kunnu hava tað frælsi at vera tey, ið tey eru.

– Hetta er onkursvegna eitt afturstig fyri mannaættina. Vit hava roynt at ment okkum sum samfelag í túsundtals av árum, og skal man koma hartil, at vit í 2020 mugu hvør í sínum lagi seta myndatól upp, ið filmar hvønn annan 24 tímar um døgnið, er talan um eitt stórt afturstig fyri okkum sum samfelag, sigur Páll á Reynatúgvu at enda.

HALLUR@SOSIALURIN.FO

# BIG BROTHER IS WATCHING

...Men bara inni í handlum og fyritøkum. Føroysk lóggáva loyvir hvørki myndugleikum ella fyritøkum at halda eyga við almenna rúminum



DANJAL AV RANA

Dátueftirlitið er myndugleikin á økinum, tá um vakmyndatól ræður. Nýtslan av vakmyndatólum er støðugt vaksandi í londunum rundan um okkum, og Dátueftirlitið metir, at hetta sama eisini er galdandi í Føroyum.

Tað eru tó nógv strangari reglur fyri nýtsluni av vakmyndatólum í Føroyum enn í grannalondunum, serliga hvat eftirlitið av almenna rúminum ræður.

Síðani 2007 hevur tað verið eitt krav, at øll vakmyndatól sum viðgera persónsupplýsingar, tað vil siga, vakmyndatól, har fólk síggjast og kunnu eyðmerkjast, skulu fráboðast Dátueftirlitinum.

Frá 2007 til 2015 hevur Dátueftirlitið fingið 140 fráboðanir um vakmyndatól, men sannlíkt er, at í fleiri førum umfata fráboðanirnar fleiri tól. Sambært Dátueftirlitinum er talan allarhelst um væl yvir 1.000 vakmyndatól, sum eru sett upp í Føroyum. Millum annað eru eini 45 vakmyndatól sett upp á nýggja flogvøllinum.

Í allarflestu førum er talan tó um, at vakmyndatól eru sett upp inni í handlum og fyritøkum, og einans nøkur heilt fá hava fingið loyvi at seta vakmyndatól upp uttandura, tó altíð á slíkan hátt, at fólk á gøtuni ikki skulu kunna eyðmerkjast. Dátueftirlitið hevur regluligt eftirlit við, at vakmyndatólini venda á slíkan hátt, at eftirlit er við vørum og bygningum, heldur enn fólkum, ið ferðast á økinum.

Tórshavnar Kommuna fekk loyvi at seta nøkur slík vakmyndatól upp í 2013, tá standmyndirnar hjá Steinunn Thórarinsdóttir stóðu í býnum. Tær fingu ikki frið fyri ótangum, og Tórshavnar Kommuna søkti tí um loyvi at seta nøkur vakmyndatól upp at halda eyga við teimum. Tá standmyndirnar fóru av landinum aftur, vóru vakmyndatólini tikin niður aftur, sambært KT-deildini hjá Tórshavnar Kommunu.

Tórshavnar Kommuna fekk loyvi at seta somu vakmyndatól upp aftur, tá ótangar gjørdu seg inn jólatrøini í miðbýnum í fjør. Tey eru tó eisini tikin niður aftur, sigur KT-deildin.

Dátueftirlitið viðgjørdi herfyri eitt mál, har tað var komið teimum fyri oyra, at hýruvognar vóru farnir at nýta vakmyndatól, til at skráseta ófantaliga koyring og annað. Dátueftirlitið kannaði málið og kom fram til, at talan einans var um tann eina hýruvognsføraran. Viðkomandi fekk boð um at vakmyndatólið skuldi fráboðast, men tá hann ikki lat við seg koma, meldaði Dátueftirlitið málið til Føroya Landfúta. Hýruvognsførarin fekk at enda eina bót á 5.000 krónur.

Politi

## Vakmyndatól høvdu gjørt mun

*Hildur Hentze sigur, at løgreglan hevur eingi vakmyndatól í býnum, men nýtir tey hjá virkjum og fyritøkum, um mett verður, at tey hjálpa*

DANJAL AV RANA

Ein av høvuðsgrundgevingunum fyri at nýta vakmyndatól í almenna rúminum, er at minka um lógarbrot, so sum harðskap, neyðtøku og herverk.

Júst í løtuni er eitt mál aktuelt í Føroyum, har vakmyndatól hava spælt ein leiklut. 30. septembur møtti ein genta á løgreglustøðini í Havn og segði seg hava verið fyri eini neyðtøkuroynd. Hon hevði tó rópt og sligið so hart ímóti, at maðurin var flýddur av staðnum.

Løgreglan hevði sum so einki spor at ganga eftir og sendi eina eftirlýsing út eftir manninum í miðlunum. Harumframt fór løgreglan á gátt hjá handlum og fyritøkum í økinum og bað um at síggja upptøkurnar frá vakmyndatólum teirra.

Tað vísti seg at geva úrslit. Løgreglufólkini kendu gongulagið á einum manni aftur, í bakgrundini á einum av upptøkunum, og vóru soleiðis beindir á rætta slóð. Viðkomandi var tá farin til skips, men tá hann kom til lands aftur 19. oktobur, varð hann handtikin. Hann hevur sitið varðhaldsfongslaður síðani, og skal fyri rættin 18. mai.

> *» Onkuntíð vilja tey, ið hava upptøkurnar ikki vísa okkum tær, og tá mugu vit so í rættin fyrst, fyri at fáa fatur á upptøkunum«*
>
> *Hildur Hentze, løgreglukvinna*

Hildur Hentze, kanningarleiðari, sigur, at løgreglan hevur biðið um loyvi at seta vakmyndatól upp ymsa staðni, men at Dátueftirlitið hevur noktað umbønini. Í ársfrágreiðingini hjá Dátueftirlitinum frá 2011 nevnir Dátueftirlitið, at bæði kommunur og løgreglan hava biðið um loyvi. Umbønin frá kommununi er sýtt, av tí at tað, at avdúka brotsverk er mett sum eitt politimál og ikki uppgávan hjá kommununi.

Dátueftirlitið vísti annars á, at løgreglan er ein danskur myndugleiki í Føroyum og er tí ikki fevnd av føroysku persónsupplýsingarlógini. Lógargrundarlagið undir viðgerðini vildi tí verið ein donsk lóg frá 1978, og Dátueftirlitið metti tí, at tað ikki hevði verið ráðiligt at fara undir uppsetan av vakmyndatólum við eini ótíðarhóskandi lóggávu á økinum.

Løgreglan hevur tí ikki nøkur vakmyndatól sett upp, annað enn á sínum egna øki. Hildur Hentze, kanningarleiðari dylir tó ikki fyri, at tað hevði verið eitt hent amboð, og at tey, sum eru sett upp, vera í ávísan mun nýtt.

– Vit fara inn á skeinkistøð, sum hava vakmyndatól, um vit meta, at tey kunnu vísa okkurt. Tey vísa tó sjáldan, hvat hendir uttanfyri. Tað er jú ikki loyvt at vísa, hvat henir úti á alfaraveg. Tað hevði tó hjálpt okkum í okkara arbeiðið, sigur Hildur Hentze.

### Ressursukrevjandi

Hon sigur, at tað er tó ikki bara bara at fáa fatur á slíkum upptøkum.

– Vit meta frá máli til mál, um tað loysir seg. Tað er ressursukrevjandi, bæði í tíð og útgerð. Onkuntíð vilja tey, ið hava upptøkurnar ikki vísa okkum tær, og tá mugu vit so í rættin fyrst, fyri at fáa fatur á upptøkunum, sigur hon.

– Tað hevði tó hjálpt. Man sær aðrastaðni, at fólk aftra seg við at gera býtt ting, um tey halda, at Big Brother heldur eyga við teimum, sigur hon.

– Harumframt hevði tað verið gott fyri offrini, tey, sum eru fyri harðskapi, at vit lættari fingu fatur á teimum, sum hava lopið á tey, og at tað fekk fylgjur, sigur Hildur Hentze.

